
Skulu nú velja breytir

Nýggja skúlaskipanin gevur broyttar lestrarmøguleikar fyri bæði skúla og næming. Skúlarnir í Havn byrja nú við breytum, sum næmingarnir kunnu velja seg inn á. Í hesum sambandi skipaði Venjingarskúlin í Havn fyri foreldrafundi mikukvøldið



Niels Nattestad, skúlastjóri á Venjingarskúlanum

SVEINUR POULSEN

Tá skúlin byrjar aftur aftaná summarfrítíðina verður skúlagongdin væl øðrvísið enn hon hevur verið frammanundan.

Tá skulu næmingarnir undir eina nýggja skipan, har teir fáa møguleika at velja breytir.

Henda skipan er bert galdandi fyri 10. flokkarnar og skal verða teimum ein hjálp í teirra framtíðar valið.

Skúlarnir í Havn eru í tí hepnu støðu, at teir skulu samarbeiða, men hóast tað hava teir avgjørt, at teir tað fyrsta árið skulu verða hvør sær.

Hetta ger, at teir ymsu skúlarnir hava ymsar breytir, sum næmingarnir skulu velja.

Á henda hátt kunnu allir skúlarnir í Havn gera sær ymsar royndir, sum so skulu kókast saman til eina heild sum skal verða grundarlagið undir hvussu breytaskipanin kemur at síggja út frá skúlaárinum 1999.

Ein »temadag« um vikuna

Skipanin sum Venjingarskúlin setur í verk, gevur tríggjar valmøguleikar.

Teir hava eina handilsbreyt, eina ítróttabreyt og eina handaverk- og listbreyt.

Skipanin er soleiðis háttað, at næmingarnir ein dag um vikuna brúka allan dagin til eitt nú ítrótt.

Ætlanin við breytunum er ikki, at næmingarnir skulu gerast serfrøðingar á einum øki, men at teir skulu fáa breiðan kunning um eitt øki teimum dámar.

Á fundinum á Venjingarskúlanum mikukvøldið greiddu lærarnir á ítróttarbreytini frá teimum tiltøkum tey ætla skulu verða grundarlagið undir undirvísingini næsta ár.

Eftir teirra hugskoti fáa næmingarnir kunnleika um stórt sæð allan ítrótt.

Har verður bóltspæl av ymsum slag, frælsur ítróttur, uttandura aktivitetir - harímillum túrar kring um í landinum, og annað spennandi.

Foreldur spurdu, um næmingarnir í framtíðini skulu fáa serligt »breytarprógv«, sum kundi brúkast, eitt nú um tey skulu søkja inn á ítróttarháskúla, men svarið var, at hetta ikki er ætlanin.

Tó helt onkur lærari fyri, at tey kundu til stuttleika geva næmingunum skreytblað, men tað verður ikki roknað sum prógv.

Handilsbreytin og handilsskúlanum

Á handaverk og listbreytini fáa næmingarnir kunnleika til handaverk og list.

Tað er hinvegin ikki ætlanin at hetta skal uppfatast sum smíð, sum annars er eitt sjálvstøðugt fak.

Síðsta breytin sum Venjingarskúlin bjóðar næmingunum í 10. flokki er handilsbreytin.

Henda breytin er óiva tann, sum hevur verið torførast at seta í verk, tí í fólkaskúlanum verður ikki beinleiðis undirvíst í roknskapi og líknandi fakum.

Tí hevur Venjingarskúlin tikið upp samarbeiðið við Handilsskúlan í Havn.

Á fundinum mikukvøldið greiddu Ragnar Magnussen og Sonja Óyrabø Petersen frá teirra royndum.

Tey hava nakað koyrandi sum eitur »Ungt virki« og tað er hesari skipan Venjingarskúlin skal gerast partur av.

Hvussu samarbeiðið skal koyrast er ikki rættiliga greitt, men fleiri møguleikar eru opnir.

Skipanin á Handilsskúlanum virkar soleiðis, at næmingarnir í einum ávísum flokki verða býttir í bólkar við 4-6 luttakarum. Hesi skulu so stovnseta sítt egna virkið við øllum tí, sum tað inniber.

Hereftir skulu tey seta eina vøru í framleiðslu, sum tey síðani skulu seljast.

Á henda hátt koma tey í samband við øll tey lið, sum virkisfólk kenna frá arbeiðsdegnum - munurin er bara, at tað er í minni »format«.

Tað verður møguliga í framleiðsluni at næmingarnir á Venjingarskúlanum skulu setast inn.

Á tann hátt fáa tey kunnleika til praktiskt vinnulív, og samstundis fáa tey loyvi til at verða við, at koyra virkið.

Ein annar møguleiki er, at næmingarnir á Venjingarskúlanum verða í einum bólki fyri seg, har tey púra einsamøll skulu gera tað sama sum handilsskúlanæmingarnir gera.

Spentur um skipanina

Niels Nattestad, skúlastjóri á Venjingarskúlanum sigur, at hann er sera spentur uppá skipanina.

– Nýggja skipanin gevur broyttar møguleikar fyri næmingarnar og ger tað meira spennandi hjá teimum at ganga í skúla, sigur hann.

Niels Nattestad sigur, at næmingarnir skulu velja breyt longu áðrenn páskafrítíðina og aftaná tað fær hann so at síggja, hvussu býtið millum breytirnar fer at vera.

Øssur á páskaframsýning í Danmark

Málarin, Øssur Mohr hevur 12 málningar við á listaframsýning í gallarínum í Augustenborg í Danmark frá 9. til 19. apríl

FRANTS JENSEN

Øssur Mohr úr Fuglafirði er óivað fyrsti føroyingurin, ið stillar út á páskaframsýningini í Augustenborg í Danmark.

Framsýningin letur upp Skírisdag, 9. apríl og opið er til og við sunnudagin 19. apríl, allar dagarnar fá kl. 13. til 18. Øssur verður sjálvur hjástaddur, tá ið framsýningin letur upp.

Ein av trimum útlendingum

Øssur hevur roynt seg við framsýningum í Danmark á hvørjum ári síðani 1994.

Hetta er tó fyrstu ferð, at hann stillar út á tí navnframa gallarínum „White House" í Augustenborg.

Augustenborg er ein lítil býur bara 8 km. frá Sønderborg í Suðurjútlandi.

– Tá ið eg var niðri í 1994 tosaði eg við tey, sum skipa fyri framsýningum í „White House", men síðani hoyrdi eg einki aftur frá teimum fyrr enn nú til hesa framsýningina, sigur Øssur.

Páskaframsýningin í Augustenborg hevur verið á fleiri árum. Vanligt er, at tey eisini bjóða nøkrum útlendingum við á framsýningina.

Umframt Øssur er ein russi, Peter Reichet og ein týskari, Heike Schmidt-Ehlers við á framsýningini í ár. Fimm donsk listafólk eru eisini við á framsýningini.

Føroysk landsløg

Málningarnir, Øssur Mohr hevur við á framsýningini, eru føroyskar landslagsmyndir.

Tað er eisini hetta, ið hann hevur fingist mest við at mála. Sjálvur heldur hann annars, at føroyskir málningar eru væl umtóktir niðri.

Øssur hevur eisini sýnt fram í Føroyum. Tað hevur higartil tó bara verið tann eina framsýningin, ið hann hevur havt heilt einsamallur. Hon var í Smiðjuni í Lítluvík í 1993.

Annars hevur hann verið við á Ólavsøkuframsýningini, á Várframsýningini, á Varmakelduframsýningini og á framsýningini hjá Lions klubb.

Lesið eisini Sosialin á netinum

www.sosialurin.fo

